# Føroya Bjór bryggjað Páskabryggið



– Páskabryggið 2011 er bryggjað við stórum eldhuga, og nógv er gjørt fyri at fáa bestu góðsku og smakk, sigur Annika Waag, bryggjari á Føroyar Bjór. Hon sigur, at tann besta rávøran er sett neyvt saman, fyri at fáa eitt gott samanspæl og eina góða javnvág ímillum tann søta smakkin frá maltinum og tann beiska frá humluni.

– Páskabryggið hóskar væl aftur við mati og serliga til páskaborðið, sigur hon. Páskabryggið 2011 er bryggjað í avmarkaðari nøgd og verður til keyps í dag.

# MFS og ungpolitikarar

MFS prátaði við Dávur í Dali og Ragnar Joensen úr Unga Sjálvstýri fríggjadagin 11. mars; og nú 18. mars verður so prátað við Jógvan Arnason Djurhuus og Tór Marna Weihe úr Unga Tjóðveldi. MFS fer at spyrja um hvørja støðu Unga Tjóðveldi hevur til útbúgving og stuðul til útbúgving. MFS vil bjóða øllum áhugaðum at lurta eftir prátinum á seturskafé hjá Hvonn í Tórshavn nú fríggjadagin 18. mars kl 15:30 til kl 16:30. Seturskafé er frá kl 14 til kl 17 og veitir avsláttur til lesandu undir hægri lestur.

*MFS - Føroyar*



# Heini ikki á listanum

**Norðoya Tjóðveldisfelag váttar í dag, at Heini O. Heinesen ikki er á listanum til løgtingsvalið**

Randi Jacobsen

Á seinasta uppstillingarfundi vóru sjey fólk, sum høvdu hug at umboða felagið til komandi løgtingsval.

Tá vóru tað sjey limir í felagnum, sum vildu verða valevnisumboð, men eftir skipanini hevur felagið bara fimm umboð, og tí var neyðugt við atkvøðugreiðslu.

Annað fólkið, sum gjørdi ov stutt í atkvøðugreiðsluni, var Heini O. Heinsen, sum umboðar flokkin í løgtinginum-

Valevnini eru Fríðrik Sivertsen, Jóhann Lützen, Maiken Steinberg, Óluva Klettskarð og Steinbjørn O. Jacobsen



TÓNLEIKUR

Petur Háberg Jacobsen, Gunnar Justinussen, Jákup Zachariasen og Marner á Lofti manna bólkin, sum gongur undir navninum »4«.

# Bólkurin »4« á Summarfestivalin

## TÓNLEIKUR Bólkurin við teimum stóru hittunum fer á pallin á Summar Festivalinum

Eirikur Lindenskov

Vælumtókti bólkurin við teimum stóru hittunum fer á pallin á Summar Festivalinum. Petur Háberg Jacobsen, Gunnar Justinussen, Jákup Zachariasen og Marner á Lofti manna bólkin, sum gongur undir navninum »4«. Hetta er ein samansettur bólkur við kendum tónleikarum, sum eisini hava verið virknir sum solistar og í øðrum bólkum. 4 hevur givið eina fløgu út, og tað er ein sera væl umtókt og nógv spæld fløga.

»Her er løtan« kallast útgávan, og heitislagið á fløguni er ein av kendastu nýggjaru sangunum í Føroyum. »4« hava ikki spælt nógv live. Teir hava havt onkrar framførslur, millum annað til konsertina við Bryan Adams í Føroyum, men á Summar Festivalinum ber til at hoyra bólkin við dugnaligu sangarunum og tónleikarunum fyri fullum útblástri.



*Ein løgin aðalfundur. Vanliga eru aðalfundir fundir eigaranna, har leiðslan stendur eigarum sínum til svars fyri gongdini farna árið og eigararnir seta høvuðskósina. Men so er ikki í største peningasamtaki í Føroyum - Tryggingarsamtakinum Føroyar*

*Johan Petersen*



UPPSTILLING

*Sjálvstýrisfelagið í Norðoyggjum er liðugt við uppstilling sína*

# Trý fólk á listanum

## POLITIKKUR Norðoyar Sjálvstýrisfelag hevur valt síni fólk at seta á listan til løgtingsvalið

Randi Jacobsen

Gjárkvøldið gjørdi Norðoya Sjálvstýrisfelag endaligu uppstillingina til løgtingsvalið, og tey trý fólkini á listanum eru Jan Asbjørnsson, Jógvan Skorheim og Rúna Sivertsen.

Jan Asbjørnsson Joensen er formaður í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins.

Jógvan Skorheim er varaborgarstjóri í Klaksvík og hevur leingi verið formaður í Unga Sjálvstýrinum,

Rúna Sivertsen hevur sitið seks ár á tingi fyri Fólkaflokkin, men skifti til Sjálvstýrisflokkin.

